# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður kunngjørt, at kirkjuráðsval verður í Argja kirkjusókn, **týsdagin 6. november 2001**. Valið fer fram í Argja Kirkju nevnda dag frá kl. 10-12 og 16-18.

Valevnislistar skulu verða formanninum fyri valstýrinum, Erland Rasmussen, í hendi seinasta lagi **9. oktober kl. 19.00**. Valevnini mega í mesta lagi vera 13 og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskriva listan. Høvuðstreytin fyri valrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 6. november 2001, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 7 limir í kirkjuráðið.

Krossur verður settur annaðhvørt fyri listan ella fyri **einum** valevni á listanum.

Øll valevni skulu skrivliga geva váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, at tey eru sinnað at undirskriva tað váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta í **Argja Kirkju 8. og 9. oktober, báðar dagar frá kl. 17.00-18.00; annars á telefon nr. 21 46 99.**

Argir, hin 19. september 2001.

**Valstýrið fyri Argja kirkju**

# Granskingarhjálpari

Søkt verður eftir einum granskingarhjálpara til Føroyamálsdeildina at arbeiða 3/4 tíð. Starvið er fyribils tíðaravmarkað til 30.4. 2002.

Uppgávan hjá granskingarhjálparanum verður at arbeiða við staðanøvnum.

**Førleikakrøv:**
- exam.art.-prógv í Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum
- góð samstarvs- og samskiftisevni

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið er í lønarflokki III.

Starvið verður sett frá 1. november ella skjótast til ber.

Nærri fæst av vita um starvið við at venda sær til Jógvan í Lon Jacobsen, megindeildarformann.

Umsóknarfreist er 15. oktober 2001. Umsóknir við avritum av próvskjølum, viðmælum o.ø. skulu sendast:

**Føroyamálsdeildini**
V.U. Hammershaimbs gøtu 16
FO-100 Tórshavn
telefon 315304
faks 318448

# Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Frá 1. nov. 2001 og restina av skúlaárinum er eitt vikariat leyst at søkja í lærugreinunum

**støddfrøði og alisfrøði.**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: **Mads A. Winther, Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 18. okt. 2001.

# Umboðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 25. oktober 2001.

4 umboð í Tórshavnar valdømi eru uppá val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 11. oktober 2001.

**Havnar Sjúkrakassi**
26. september 2001



**zarepta - 2001**

# ZAREPTA-legurnar 2001

Um GUD vil, er ætlanin aftur í ár at hava eina heystlegu í Zarepta í Vatnsoyrum frá fríggjadegi 12. oktober til mánadagin 17. oktober.

Legan er fyri 14–17 ára gomul og kostar kr. 400,00 fyri hvønn, íroknað ferðakostnað báðar vegir.

Tekning av leguluttakarum fer fram frá 1. okt. til 10. okt. á tlf. 315390.

Tekning av starvsfólki fer fram á tlf. 283776.

*Verið vælkomin til Zarepta*

# Kunngerð

## um framløgu av byggisamtykt og bygdaskipan fyri Hvalvíkar kommunu.

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini og bygdaskipanini fyri Hvalvíkar kommunu, verður lagt fram til almenna eftirskoðan á kommunuskrivstovuni frá 27. sept. 2001 til 18. okt. 2001, báðir dagar íroknaðir.

Kommunuskrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 13.00.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, mugu vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 27. desember.

**Hvalvíkar kommuna**



# Venjingartíðir

## í fimleikarhøll Eysturskúlans

Nú byrjar Judo-venjingin aftur.

Tilmelding av nýggjum limum verður mánadagin 1. oktober kl. 18.00-19.00 í Eysturskúlanum.

**Venjingartíðir.**
Fyribils.

**Nýggir limir.**
Børn
Mánadag og mikudag kl. 18.00 - 19.15

Blandað lið
Mánadag og mikudag kl. 19.15 - 21.00

**Havnar Judofelag**

# Maskinsmiðir

Søkt verður eftir maskinsmiðum til ymiskt smiðjuarbeiði, at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir nærri avtalu.

Søkt verður eftir einum lærlingi til maskinsmið, at byrja skjótast gjørligt.

**P/F TANGAVIRKIÐ**
Tlf. 298 373065 · Fax +298 373934
FO-900 Vágur



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari til Býlingshúsið inni á Gøtu

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Býlingshúsið inni á Gøtu, at byrja 15. november 2001.

Stovnurin er settur saman av trimum stovum: tvemum barnagarðsbólkum við 21 í hvørjum og einum barnagarðsbólki við 16 børnum, sum halda til í gamla skúla á Hvítanesi.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran hevur stóran týdning í dagliga arbeiðinum. Tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit ynskja at umsøkjarin**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunir)
- er opin og positivur
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum barnagarði
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag, merktan av virðing fyr børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis, herundir við spælistovuna sum er undir somu lon
- dugir at síggja fyrimunir fram um forðingar
- hevur teldukunnleika

**Setanarviðurskifti**
Sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 12. oktober 2001.

SNARSKIVAN

FØROYA HANDILSSKÚLI

# Datanomskeið

**Í heyst er ætlanin at hava tvey datanomskeið.**

- **Dátugrunnar II** uml. 40 tímar kostnaður 2.200,- kr.
- **Systemmenning I**: Menning, design og viðlíkahald av WEB-sites, 40 tímar kostnaður 2.200,- kr.

Undirvíst verður frá kl. 14.00 - 18.00
hesar dagar:
Okt.: 22., 23., 24., 26., 29., 30. og 31.
Nov.: 22., 23., og 26.
Próvtøkan verður 5., 6. og 7. desember 2001.

Meira fæst at vita um skeiðini á heimasíðuni: **http://heima.olivant.fo/~jonsen/datanom** ella at biðja skúlan um tilfar á tel 317177, fax 313374. Eisini ber til at venda sær til Føroya Handilsskúla á Kambsdali eftir tilfari, tel 444900, faks 444901.

Framtíðin kemur av sær sjálvum, tað ger framburður ikki: Menn tín førleika við nýggjari vitan. Fyrireika teg til framtíðar avbjóðingar.

Seinasta freist at tekna seg er **fríggjadagin 12. okt.**

*Skeiðini verða hildin treytað av, nóg nógvir luttakarar tekna seg.*
*Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Tórshavn
Tel 317177, Fax 313374, t-postur:dt@hsh.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari til Tannlæknastovuna

Starvið sum leiðari av tannlæknastovuni hjá Tórshavnar kommunu er leyst at søkja til setan skjótast til ber.

Tannarøktin fevnir um uml. 4.800 børn í aldrinum 0-16 ár.

Á tannlæknastovuni hjá kommununi arbeiða, umframt leiðaran, 4 tannlæknar, 2 tannarøktarar og 11 tannlæknahjálparar. Elektronisk skráseting (DSI-tand) verður nýtt, sum koyrir á einum sentralum servara.

Leiðarin av tannlæknastovuni tekur lut í tí dagliga arbeiðinum á tannlæknastovuni og syrgir fyri tí fyrisitingarliga og ráðleggingarliga og fyri trygd og álit barnanna.

Tannlæknastovan hevur samstarv við ordontodontikonsulent sum vitjar á tannlæknastovuni tvær ferðir um árið fyri at ráðgeva innan øki.

**Vit ynskja at**
Leiðarin skal hava eitt gott samstarv við starvsfólkið og myndugleikarnar og skal í hesum sambandi áhaldandi menna starvsfólkið og tannlæknastovuna í síni heild.

**Setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært avtalu við Dansk Tandlægeforening.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra (gunnleyg@torshavn.fo) , ella Eyðun Jensen, deildarleiðara, (eyðun@torshavn.fo), tlf. 315160.

**Umsóknir**
Umsóknir og neyðug skjøl skulu verða Tórshavnar kommunu, postboks 32, Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. oktober 2001.

SNARSKIVAN

# Lastbil/kranførari søkist

Søkt verður eftir lastbil/kranførara við prógvi at byrja beinanvegin.

**OCD**
Heiðavegur, 600 Saltangará
Tlf. 447200 • Fartlf. 222300

# Høvuðsreingerð

Dugnalig kvinna søkist beinanvegin til privat hús í Havn.

Skriva til:
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
**Bill. mrk. 180-9**

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

SKALT TÚ MÁLA?

Lat okkum mála fyri teg!

Eyðun Jacobsen
Málarameistari
Glyvrar
Tlf. 448355
Fartlf. 226504

Sosialurin 311820



Muskelterapeut
VØDDAVIÐGERÐ
Hevur tú:
• høvuðpínu • læsta øksl
• músa-arm • knýttar vøddar o.a.
• **ella ynskir tú viðgerð fyri vælveru**

**Hervør Jacobsen**
LÆKNAEXAM. MUSKELTERAPEUT

**Tlf. 21 30 34**
(eftir kl. 16.00 vanl. gerandisdagar, tó ikki hósdag)